## VIÐMERKINGAR

# Víðfevndur grundleggjandi munur á Tjóðveldis- og Fólkaflokkinum

**Meðan Fólkaflokkurin er borgarligur sjálvstýrisflokkur, er Tjóðveldisflokkurin sosialistiskur loysingarflokkur. – Munurin á flokkunum er nógv størri enn eg roknaði við, áðrenn eg fór í samgongu fyri 4 árum síðani**



**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður Fólkafloksins*

Seinastu fýra árini hava vit sitið í samgongu við Tjóðveldisflokkinum. Lat tað vera sagt, at nógv er komið av skafti, tíðirnar hava verið góðar, inntøkumøguleikarnir hava givið okkum rúm fyri íløgum, sum koma at hava stóran týdning fyri samfelag okkara, og vit eru komnir væl á leið við málinum vit settu okkum á sjálvbjargnisleið.

Umframt at rúm hevur verið fyri týdningarmiklum íløgum, er almenni raksturin øktur, tíverri helst uttan, at røttu persónarnir hava fingið fullan valuta fyri hesa hækking.

Vit skulu minnast til, at tað er aðalmunur á vinstravenda Tjóðveldisflokkinum – serliga í yngra ættarliðinum – og borgarliga Fólkaflokkinum, sum ikki bert trýr uppá privata fyritakssemi, men metir, at neyðugt er, at avlopið bæði hjá fyritøkum og hjá tí einstaka, varð meiri sjónligt.

**Fólkaflokkurin – lágskattaflokkur**

Meðan Fólkaflokkurin er ein lágskattaflokkur, hevur tað víst seg – í øllum førum hesi fýra árini eg havi sitið í samgongu við Tjóðveldisflokkinum – at teimum dáma ikki, at fyritøkur hava ov stórt avlop, og heldur ikki, at skatturin og óbeinleiðis gjøldini til tann einstaka skulu lækkast, so meiri verður eftir hjá honum at brúka fyri og uppá seg sjálvan.

Her er stórur munur á hugsunarháttinum hjá Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, ja, so stórur, at onkur tingmaður er ræddur fyri, at "so fer fólkið at vinna ov nógvan pening".

Eg kenni ein færra av vónbroti, at vit eitt nú ikki hava fingið "serskatting av hjúnum, har bert annar hjúnarfelagin hevur inntøku", so, at meiri er eftir hjá báðum, og vit fáa eitt sunnari samfelag. – Her hevur Tjóðveldisflokkurin drýggja málið soleiðis, at hetta helst ikki kemur ígjøgnum í hesi tingsetu. – Hetta harmist eg yvir, og tí vera vit nú noyddir til at leggja harðari trýst á Tjóðveldisflokkin fyri at fáa teir at skilja støðuna, so at eitt úrslit spyrst burturúr áðrenn skeiðið endar.

Munurin á borgarliga Fólkaflokkinum og sosialistiska Tjóðveldisflokkinum kemur eisini týðiliga til skjals, at meðan Fólkaflokkurin gevur tí einstaka frælsi til at stýra sínum egna so vítt gjørligt, og at avlopið er so gott sum tilber, vil Tjóðveldisflokkurin tað øðugta nevnliga, at fyritøkur og fólkið hava so lítið eftir av peningi til brúk ella konsolidering, tí veikar fyritøkur og borgarin, ið ikki hevur tað serliga gott búskaparligt, eru lættari hjá tí almenna at stýra.

**Túra fram við 4-ára skiftistíð**

Lat meg eisini her skoyta uppí, at meðan Tjóðveldisflokkurin víðgirdi seg við "øllum ella ongum" á sjálvstýrisleið, og kom bæði samgonguni og Føroya fólki í eina torføra støðu, bragdaði ikki fyrr enn leiðsla Fólkafloksins við øllum tingfólki floksins einaferð með alla gjørdi støðuna upp.

Hagartil eru vit nú komin, hóast Tjóðveldisflokkurin túrar fram við 4-ára skiftistíð, sum Fólkaflokkurin ongantíð hevur góðtikið.

Henda greinin skal takast sum hon er, nevniliga, at eg hevði ikki roknað við í roynd og veru, at so stórur munur var á sosilistiska Tjóðveldisflokkinum sum kann gerast ein vandi fyri landið, og so Fólkaflokkinum, sum er borgarligur við álitisvekjandi sjálvstýrismáli.

Jú, munurin á sosialistiska Tjóðveldisflokkinum – serliga yngra ættarliðinum – borgarliga sjálvstýrisflokkinum er veruliga nógv størri, enn eg hevði roknað við áðrenn eg fór í samgongu við teir fyri fýra árum síðani.

# Hvussu langt ætla Høgni Hoydal og Karsten Hansen at fara við ósannindum ?

**Helgi Abrahamsen**



"Einki ósatt", kallast yvirskriftin á eini grein, sum Høgni Hoydal og Karsten Hansen høvdu í bløðunum mikudagin. Í greinini siga teir, at Lisbeth L. Petersen hevur lagt teir undir at siga ósatt, og at hetta er grovt persónsálop og manipulasjón við sannleikanum.

**Er trúvirðið við at fara ?**

Helst hevur Karsten Hansen havt ein ringan dag í tinginum tann 9. oktober, tí ikki færri enn tvey álvarsom ósannindi av hansara munnu henda dagin eru seinni avdúkaði. Og fyri at vaska hendur, brúkar hann nú tað triðja.

**Ósannindi nr. 1**

Tað fyrsta, sum Karsten Hansen gjørdi seg sekan í henda dagin, var at siga, at allur tann danski blokkurin stóð í Landsbankanum. Hetta vísti seg seinni at vera (fyri trý tey seinastu árini) 1,6 mia. krónur við síðuna av veruleikanum.

**Ósannindi nr. 2**

Tey næstu ósannindini hjá Karsteni Hansen henda dagin vóru, at hann segði (og eg endurgevi orðarætt, fyri at eingin misskiljing skal vera): "...Tað sum fór fram millum annað í sambandi við fíggingina, tað var jú at danir teir umfíggjaðu skuldina hjá okkum, og sjálvir høvdu teir fíggjað frá grundini av aðrastaðir frá, fyri millum 5 og 5,5 prosent. Og teir vóru so beinasamir, at teir lántu tað víðari til tað niðurpínda føroyska samfelagið fyri 7 prosent..." (endurgeving endað).

At siga, at lánið varð tikið við eini renta uppá millum 5 og 5,5 prosent, og at tað varð latið víðari fyri 7 prosent, tað er tað sama sum at siga, at danir høvdu rentuvinning !

**Ósannindi nr. 3**

Nú eru Høgni Hoydal og Karsten Hansen í øðini, tí at Lisbeth L. Petersen hevur avdúka hesa villeiðing. Teir kalla hetta fyri lægstu vápn í politikki og ósannindi. Teir skriva millum annað soleiðis: "Lisbeth L. Petersen leggur okkum undir at hava sagt, at danski staturin hevur "tjent sær eyka rentu" uppá lánini til Føroya undir kreppuni. Hetta er síðani endurtikið í fjølmiðlunum. Men hetta eru orðini hjá Lisbeth – ikki okkara."

- Jú víst eigur - í hvussu so er annar av tykkum - hasi orðini!

**Heimasíða Løgtingsins**

Fyri at vaska hendurnar snjóhvítar, siga Høgni Hoydal og Karsten Hansen, at ein og hvør kann fara inn á heimasíðu Løgtingsins og hoyra við egnum oyrum, hvat sag varð í tinginum. – Og hví siga teir nú tað? - Jú teir vita sum er, at heimasíðan hjá løgtinginum er sera umfatandi, og at tað verða tey fækstu – helst eingin – sum fer at leita eftir orðaskiftinum har. Men fyri at lætta um hjá lesaranum, kann eg her upplýsa, at ein skjótari vegur, er at fara inn á heimasíðuna hjá Sambandsflokkinum (www.samband.fo), har orðini nú eru løgd út.

**Landsstýrismálanevndin**

Høgni Hoydal og Karsten Hansen enda greinina við at siga, at fyri at fáa allan sannleikan fram í hesum máli, hava teir gjørt av at heita á landsstýrismálanevndina hjá Løgtinginum um at kanna málið og gera sína niðurstøðu.

Høgni og Karsten vita, at landsstýrismálanevndin einans heldur eyguni eftir, um starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt. Eisini vita teir, at nevndin ger ikki niðurstøður. – Og tá er lætt at biðja um at verða kannaður.

# Til minnis um Heðin Wardum

## 21/10–1937 – 30/12–2001



Tað kom ógvuliga dátt við, at Randi kom á gátt 30/12–2001 at bera okkum boðini, at Heðin var deyður.

Vit arbeiddu saman hvønn dag, men hann nevndi ongantíð nakað um, at heilsan kanska var farin at bila.

Eg kom at kenna Heðin fyri 47 árum síðani, tá hann 17 ára gamal júst liðugur við Realskúlan kom at arbeiða hjá trolarafelagnum P/F Kimbil. Skrivstovan hjá Kimbili var tá (heima) á Bryggjubakka, men flutti út á Vestaru Bryggju, tá Bacalao gjørdi 2. bygningin í 1956. Í nøkur av seksti- og sjetiárunum kom Heðin at taka sær av bókhaldinum hjá Bacalao. Tá skrivstovan hjá Kimbil varð løgd saman við Bacalao kom Heðin aftur at taka sær av skipunum og tað er eingin loyna, at best dámdi honum arbeiðið við skipunum. Tá Bacalao í 1993 fór í Fiskavirking, kom Heðin at halda fram sum bókhaldari fyri tey 4 skipini, ið eru eftir og hetta starvið røkti hann til fulnar til deyðadag sín.

Hann var óvanliga nærlagdur í arbeiði sínum og tá hann var liðugur við arbeiði sítt, var stórt sæð einki hjá nøkrum grannskoðara at koma eftir aftaná.

Eg kendi ikki bert Heðin frá samstarvi okkara. Í nógv ár serstakliga í seksti- og sjeytiárunum ferðaðust vit nógv saman á rossabaki á Streymoyar- og Vágafjøllum. Hesi árini plagdi hann eisini at skógva rossini og tað var altíð so vælgjørt, at eg hvørki fyrr ella seinni havi sæð so væl og vakurt skødd ross.

Sama var við hondskriftini hjá Heðini, sum var so tiltikin vøkur, at eg enn ongantíð havi sæð eina hondskrift, sum á nakran hátt kann samanberast við hana.

Tað fellur tungt at skriva hesi orð, tí tað var so óvæntað, at tú skuldi fara so tíðliga. Vit arbeiddu saman í 47 ár. Vit vóru saman í stóru sorgarløtuni, tá Stella Argus fórst og tá Nólsoyar Páll misti 4 mans. Vit vóru saman í gleðisdøgunum, tá nýbygningarnir Brandur Sigmundarson, 2x Brestir, 2x Beinir, Kallsevni, Grímur Kamban og fleiri aðrir komu til landið og gleddust um at samstarva í feløgum í framburði.

Tann tíðin er nú farin og livir bert í minnunum á gomlum monnum.

Tað var gott at kenna teg. Tað var svárt at missa teg. Skula nøkur troystarorð vera at siga, so eru tey, at fáar dagar áðrenn deyðadag tín, segði tú tína vón vera, at tá tú skuldi hiðani, skuldi tað vera "uppá eingang og ikki aftaná langa, óvirkna sjúkralegu". Í so máta fekst tú ynski títt uppfylt.

Hvíl í friði, góði vinur.

***Aksel***



## VIÐMERKINGAR

Búskapargrunnur

# 7 góð ár, og hvat so?

**Álvur Kirke**



Vit minnast enn tey glaðu 80-árini, og vit minnast enn betur fyrrapartin av 90-árunum. Men vit gloyma tíbetur skjótt tað illa, og nú gleðast vit aftur um, at tað gongur so væl.

Menniskju eru so ymisk. Summi stúra fyri hvørjum degi, og summi bara gleðast í dag, og hugsa ikki um morgindagin.

Men, tað er ein sannroynd, at vit hava góðar tíðir, og vit hava vánaligar tíðir. Tíðirnar skifta, og vit fáa næstan einki gjørt við tað!

Í 80-árunum var einki ófført, vit hildu, at vit kundu alt. Vit kláraðu okkum væl uttan at blanda Gud uppí. Og, hví skuldu vit tað? Tað gekk jú so væl?

So kom 1992, og veitslan var liðug. Vit vóru fleiri, sum sóu, at einaferð fór veitslan at enda, men helst roknaði eingin við, at endin fór at verða soleiðis, sum hann varð.

Nú verður tosað um ein búskapargrunn, og tað er ein góð, vís og bíbilsk hugsan. Men, hvussu ber tað til, at búskapargrunnurin ikki er stovnaður fyri fleiri árum síðani?

Tá Jósef var í Egyptalandi, sat hann í fangahúsi. Sum vit vita, var hann ein droymari. Hann ikki bert droymdi, men Gud opinberaði týðandi ting fyri honum, - í dreymi. Og fangarnir fingu hetta at vita, og teir vitstu, at Jósef kundi týða dreymar.

Men, so droymi Farao ein dreym um sjey góðar kýr og sjey rak og ljótar kýr, - og um sjey góð øks og um sjey tóm øks. Boð vóru send eftir Josefi, og hann segði, hvat dreymurin hevði at týða:

"Tær sjey góðu kýrnar eru sjey ár, og tey sjey góðu øksini eru sjey ár – hetta er ein og sami dreymur.

Og hinar sjey kýrnar, ið vóru so rak og ljótar, og sum komu upp aftan á teimum, tær eru sjey ár, somuleiðis tey sjey tómu øksini, ið vóru svidnað av eystanvindi; tí tað koma sjey hungursár.

– Tað er, sum eg segði við Farao: Tað, ið Gud ætlar at gera, hevur Hann latið Farao síggja.

Tað koma sjey ár við stórari yvirflóð um alt Egyptaland.

Men aftan á tey koma sjey hungursár, so at øll tann yvirflóð skal verða gloymd í Egyptalandi, og hungurin skal arma landið út.

Eingin skal minnast yvirflóðina, ið var í landinum, fyri hungrinum aftaná; tí hann skal verða ógvuliga svárur.

Og at Farao hevur havt dreymin tvær ferðir, tað vil siga, at hetta er fast avgjørt av Gudi, og at Gud fer at lata tað henda skjótt.

Nú skuldi Farao valt sær ein skilagóðan og vísan mann og sett hann yvir Egyptaland.

Tað skuldi Farao gjørt, og so sett umsjónarmenn yvir landið og tikið fimtingin av grøðini í Egyptalandi, tey sjey árini ið yvirflóðin verður.

Teir skulu, hesi góðu árini ið koma, savna alt, ið kann duga til føði, og dunga saman korn til føði í býunum – sum ogn Faraos – og ansa eftir tí.

Kornið skal so vera til at taka hjá landinum tey sjey hungursárini, ið koma skulu á Egyptaland, so at landið skal ikki ganga til grundar av hungrinum."

– Hesi orð dámdi bæði Farao og øllum tænarum hansara væl;

Farao segði við tænarar sínar: „Hvar finna vit ein mann, sum Andi Guds er í sum í honum!"

So segði Farao við Jósef: „Táið Gud hevur opinberað tær alt hetta, so er eingin líki tín í viti og vísdómi!

Tú skalt standa fyri húsi mínum, og eftir orði tínum skal alt fólk mítt rætta seg; bert hásætið skal eg hava fram um teg."

Framvegis segði Farao við Jósef: „So seti eg teg nú yvir alt Egyptaland!" 1. Mós. 41, 26-41

Hetta er tað, sum vit eiga at gera. Vit skulu stovna ein búskapargrunn, seta pening í grunnin í góðum árum, og hava henda pening at hava til at taka í "hungursárunum", ið koma, so at landið ikki skal ganga til grundar.

Løgtingsval verður í apríl, og tá er umráðandi, at tey røttu verða set til at standa fyri "húsi" okkara, Føroyum.

# ".. men kósin hon er enn ikki sett.."

**Eli Hentze**



Leygardagin hevur Fótbóltssamband Føroya ársaðalfund. Nýggjur formaður skal veljast. Fótbóltsbossurin, ið fjølmiðlarnir seinastu tíðina hava yndað at kalla mannin, leggur frá sær eftir drúgva tænastu. Undirritaði takkar Torleifi fyri gott og drúgt arbeiði. Nógv er hent í føroyska fótbóltsheiminum hesi árini klaksvíkingurin hevur sitið á ovastu trúnu Fótbóltssambandsins. Á útbúgvingarøkinum er nógv hent! Fótbóltsskúlarnir hava góða undirtøku, bert fyri at nevna nøkur jalig viðurskifti. Stórstu avgerðirnar hava verið, at Føroyar fingu limaskap bæði í evropeisku og alheims fótbóltssamgonguni. Føroysku litirnir veittrað yvir stórar fótbóltsleikpallir runt um í Evropa, og tey føroysku feløgini hava síðani 1992 tikið lut í evropeisku liðkappingunum. Hesi risafet hava skapt eina minni kollvelting á føroyska fótbóltspallinum. Torleif hevur víst vegin, og saman við øðrum havt dirvið og áræði at lata føroyskan fótbólt í aðrar skógvar. Hansara róligi og diplomatiski framburður hevur verið hansara aðalmerki. Treyðugt so, onkutíð hevur hann traðkað eitt sindur við síðuna av, men tað gera væl tey flestu. Takk fyri drúgva tænastu!!

Nýggi formaðurin í Fótbóltssambandinum Dánjal Andreassen, ið er einasta valevni til fundin, hevur boðað frá, at samskifti við føroysku feløgini skal rættast uppaftur. Við øðrum orðum, okkurt er galið við samskiftinum millum feløgini og Fótbóltssambandið! Men, hvat er galið?? Løgin síðstu orð at geva fráfarandi formanni sínum. Tí er samskifti ikki í lagið, so má Torleif hava høvuðsábyrgdina, ella..!? Og so í veruleikanum onki meira frá komandi formanninum í relativt risastóra felagsskapinum FSF. Hvar eru ætlanirnar? Formaðurin í Fótbóltssambandi Føroya má og skal hava nakar hugsjónir um, hvør kósin er! Hvar eru "visiónirnar"? Hvar er fótbóltspolitikkurin? Ikki eitt orð!

Jú, Tórsvøllur skal vera eldrasambýli fyri 150 milliónir krónur, sigur Poul Michelsen, Tórsvallarovastin, og føroyskur fótbóltur hevur brúk fyri umleið 100 milliónum krónur til sokallaðu "minstu krøv" frá evropeisku fótbóltssamgonguni UEFA, sigur aðalskrivarin í FSF Ísak Mikladal. Beint nú havi eg hug at koyra pennin í lumman ella stoyta blekkið í ruskspannuna!

Tit sum koma at manna nevnd Fótbóltssambandins mugu og skulu stinga út í kortið! Tit mugu og skulu vera undangongumenn! Okkurt er sum bendir á, at nevndararbeiðið í Fótbóltssambandinum má betrast munandi. So allarhelst skal nýggji formaðurin hyggja nærri eftir arbeiðslagnum innanveggja, áðrenn hann leitar út um garðarnar. Á síðsta og á næstsíðsta eftirmetingarfundi við feløgini hevði kappingarnevndin snøkt sagt onki at bjóða. Eg spæli bóltin yvir til tykkum, segði formaðurin í kappingarnevndini á síðsta fundi, og so sótu vit øll har og bitu negl og fóru at kjakast um smálutir, ið hoyra heima á spæliplássinum í barnagarðinum, har børnini royna at finna sítt pláss á lívsins trappu. Út av lagi óprofessionelt!! Tit í kappingarnevndini gera ikki tykkara heimaarbeiði nóg væl og langt í frá!! Og tað er ikki tí, at tit mangla viðurskifti, ið áttu at verið tikin upp til viðgerðar.

Dómaranevndin hevur ikki verið fullmannað síðani Óli Holm varð valdur formaður í VB fyri meira enn einum ári síðani. Hví?

"..men kósin hon er enn ikki sett.." sigur fólkasangarin Kári p í sanginum Hálvgum Mestsum Ov. Jú, orðini eru tikin úr samanhanginum og flutt yvir í annan heim, men tey kunnu væl brúkast. Tí enn letur ikki í ovastu sovjettuni um, hvør siglingarleiðin er best at halda.

Eg fari at ynskja Dánjali Andreassen góða eydnu í nýggja starvinum við vónum og ynskjum um gott samstarv komandi árini.

Hesi fáu orðini eru míni persónligu!

Við ítróttarkvøðu

*PS: nýggi landsliðsvenjarin er vónandi ikki ein "kapasitetur", sum nærum bert sæst millum kavaflykrurnar norðuri í Klaksvík, tá ið Klaksvíkskappingin er og í sólbrillum ella við regnskjóli til Ólavssøkufinaluna!!!*

# Grindamenn á grindafund

**Fyrsti upplýsingarfundurin hjá Grindamannafelagnum verður í Sørvági mánakvøldið**

GRIND
*Eirikur Lindenskov*

Aftur í ár skipar Grindamannafelagið fyri kunnandi og upplýsandi fundum kring landið. Í ár verður farið til Vágarnar, Norðstreym og Eysturoynna, sigur Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum.

Fundurin í Vágum verður í skúlahøllini í Sørvági mánakvøldið komandi kl 19. Skráin er fjølbroytt. Fólk frá Náttúrugripasavninum fara at greiða meira frá fylgisveinagrindini, um merking av stórhvali og um hvørjar granskingarverkætlanir, tey í løtuni eru í holt við í samband við grind, hval og kóp.

Jústines Olsen, djóralækni fer at greiða frá avlíving av grindahvali v.m. Hann hevur gjøgnum árini fylgt gjølla við og kannað avlíving av hvali. – Vit eiga altíð at gera okkara arbeiði í grind ábyrgdarfult og lýtaleyst. Tað verður ongantíð tosað nóg nógv um avlívingina, tí hana síggja øll í einum grindadrápi, og hana er tað hugsað verður um, tá ið spurt verður um, hvussu gekst í grindini. Hesin týdningarmikli parturin av arbeiðinum í grind eigur at ganga fyrimyndarliga, og eitt av aðalmálinum hjá "Grindamannafelagnum" er júst at kunna um avlívingina og greiða frá, soleiðis at føroyingar læra at skera á háls – skjótt og ruddiligt, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

Aftan á hesa ástøðiligu kunnan er bara at halda seg framat, tá ið grind er – í fyrstani við vegleiðing frá einum royndum grindamanni.

Maria Dam arbeiðir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hon hevur í mong ár kannað føroyskan mat – eisini grind og spik. Hon fer á fundunum í stuttum at greiða frá, hvørji evni eru í hvalaúrdrátti. Men vit eiga at ganga út frá, at grind og spik er góður matur, tí grindahvalurin livir í heimsins reinasta umhvørvi, siga vit – havinum kring Føroyar. Høvuðstrupulleikin, mannaættin í løtuni hevur at stríðast við, er dálking. Verður einki gjørt við hana, fer mannaættin at doyggja í sínum egna skarni, verður sagt. Men er tað nú so illa statt kortini? Sjálvandi er tað ikki tað. Tað hevur verið og verður framvegis veruliga nógv gjørt fyri at minka dálkingina – eisini her á landi. Vit kunnu altíð spyrja, um tað verður gjørt nokk, tí dálkingin er ein heimsumfatandi trupulleiki. Latið okkum liva í einum reinum landi í reinum havumhvørvi. Landsins grøði, fólksins føði.

Vónandi fáa vit eisini á fundunum kring landið eitt gott og uppbyggjandi prát um lokal grindaviðurskiftir.

Fundirnir í Norðstreymi og Eysturoynni verða nærri lýstir seinri. Aðalfundurin hjá "Grindamannafelagnum" verður leygardagin tann 6. apríl í Norðurlandahúsinum. Hetta verður lýst nærri í bløðunum.